**TELDA BÍLIGA TIL SØLU**
1200 MHz AMB Duron processor. 512 MB RAM. 128 MB Gforce 4 Ti 4200 grafikkort. 120GB harddisk. 17" skerm. 10/100 Mb netkort. CD/DVD drev. Við TVTuner-korti. Kr. 8.000,-
*Tlf. 250298/319604, Bjarki*

**TIL SØLU**
ein 2 mánaðar gomul farelda av slagnum, Dell Inspiron 8600, 1,7 intel centrino processor, 60 Gb harddisk, 512 mb Ram, 128 mb geforce fo5650 grafikk-kort, dvd-brennara, cd-brennara, 15,4" wid-screen skerm. integrerað tráðleyst netkort 11mbit. Windows-xp Professional. taska fylgir við. Prísur 15.000 kr.
*Ring 251819*

**TIL SØLU**
Game Boy Advance med 3 spil: Warioland 4, OL Salt Lake 2002, Rogue Spear. 600 kr.
*Tlf. 220687*

## Tónleikur

**BILANLEGG**
Sony minidiskavspælari + cd box 10 fløgur + 2 forsterkarar 4.000 kr.
*Tlf. 211745*

**TIL SØLU**
Trummupinnar til sølu. 50 kr fyri parið.
*Ring 772061/448755, Leif Saltangará*

**TIL SØLU**
Ein forsterkari til bilanlegg av merkinum XS-Intimidator. 880W tls. Tú hevur møguleika at velja millum 4x220, 2x440 ella 1x440. Øll stikkini eru gull. Nývirði á 5000,-kr selist fyri 3000,-kr.
*Tlf. 254153*

**TIL SØLU**
Pioneer anlegg og forsterkari til bil. Anleggið er DEH-P835R molti-cd 4x40 w, forsterkarin eitur GM-X602. Prísur 1500 kr.
*Tlf. 505428*

**TIL SØLU**
Ein Sony FM-AM Recievari nývirði 13.000,- kr. og ein SonyHard Disc Audio Recorder eisini 13.000,- kr. nývirði. Seljast saman fyri 20.000,- kr.
*Tlf. 254153*

**ANLEGG TIL SØLU**
Stórt anlegg til sølu, 1000 watt JBL Subwoofari, 2 mds forsterkara, 2 jbl hátalarar, 2 mds hátalarar og pioneer fløguspælari.
*Tlf. 221891*

**FEITT LJÓÐ!**
Droymir tú um studioljóð heima í stovuni ella til telduna? So er GENELEC røttu hátalararnir. Teir eru at finna í nærum øllum studioum í heiminum. Um tú ynskir at keypa tveir 1029A aktivar studiomonitorar við innbygdum forsterkara (bi-amped), ring so
*Tlf. 310735 eftir kl 17*

**FEITT LJÓÐ!**
Droymir tú um studioljóð heima í stovuni ella á kamarinum? So er GENELEC røttu hátalararnir. Teir eru at finna í nærum øllum studioum í heiminum. Um tú ynskir at keypa tveir 1030A bi-amped. aktivar studiomonitorar, ring so
*Tlf. 310735 eftir kl 17*

**SONY BILSTEREO TIL SØLU**
Sony explad cdx-mp30 50x4. Spælir allar fløgur, umframt Mp3. Er í góðum standi. Nýprísur 4.500, nú 3.000 kr.
*e-mail: dahlarin@hotmail.com*

## Út- & Sjónvarp

**BILANLEGG VIÐ 2 HÁTALARUM**
Blaupunkt san remo 4x40 w cd og tveir Audio X 350 w hátalarar til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 375050, tor_sor@yahoo.com*

**DVD FILMAR TIL SØLU**
Fredag den 13. sidste kapitel. Fredag den 13. begynder igen. Fredag den 13. Jason tager. Manhattan 80 kr. stk.
*Tlf. 316165*

**TIL SØLU**
Móttakari til parabol, digital, av merkinum Strong. 1.000 kr.
*Tlf. 448097*

**TIL SØLU**
Eitt Prowonic sjónvarp 28" sera bíliga til sølu.
*Ring 321328 eftir kl. 18*

**VEGNA FLYTING**
selist ein lítið brúktur DVD+RW Recorder Luxor.
*Tlf. 229405*

**PARABOLMÓTTAKARI**
Digital satellite reciever. mark. strong srt 4300 lítið brúktur, til sølu vegna flyting fyri bert 1.000,- Nýprísur 3.000,- (vegleiðing er við).
*Tlf. 322958*

## Ymiskt

**HEY HEY**
Nú nærkast til basarin í Glæmuni í Kvívík 9. mai. Um tit hava nakað, sum tit høvdu hugsa tykkum at latið til basarin, so er Glæman opin mánakvøldið 3. mai frá kl. 19.00–21.00 har møguleiki er at koma við lutum.
*Glæman, KSR og Skótarnir*

**TIL SØLU**
Inni oljutangi stødd l. 151, h. 134, b. 65 cm. kr. 1.100,-
*Tlf. 220205*

**YNSKIST**
Trappuportur ynskist til keyps.
*Tlf. 442020 eftir kl. 18*

**TIL SØLU**
Hvít Husmor vinyl vindeygu 120x120 cm, við 3-lags termoglasi bíliga til sølu.
*Tlf. 442020 eftir kl. 18*

**VÆLKOMIN Á BASAR Í KVÍVÍK 9. MAI**
har ymiskt verður at royna. Eydnuhjól, fiskibrunnur, ponyríðing, rossavognur, lutaseðlasøla og matsøla. Vinningar: parabolir, lomb, súkklur, troyggjur, videokamera, leikur og mangt annað. Øll eru vælkomin.
*Glæman, Skótarnir og KSR*

**AT FERÐAST TIL OMMU OG ABBA Í FØROYUM**
Kunnu vit fylgjast við tær í flúgvaranum heim til Føroyar tann 4. ella 10. juli og til Danmarkar 30. juli ella 1. august, vit (4 og 6 ár) eru skilagóð og rólig.
*Siri og Bárður, tlf. 0045 38113921*

**PLÁTUSPÆLARI**
Ein sonevndur kraftblokkur ynskist til keyps til ellisakfar frá 60'unum.
*Tlf. 281583*

**HJALLUR**
Mangla tygum ein hjall, ring og vit kunnu tosa um tað.
*Tlf. 226743*

**H-VINDEYGA**
úr plasti (Føroya Gluggi) b. 120 cm. h. 50 cm. til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 217846*

**BYGDARSTEVNA Í HVALBA**
Vikuskiftið 7.–9. mai verður bygdarstevna í Hvalba við tiltøkum bæði uttandura og innandura, eitt nú við nógvum fótbólti, tivoli, fólkafundi o.ø. Fríggjakvøldið 7. mai spæla Showmenn til konsert í Roynhøllini og leygarkvøldið spæla teir til stevnudans
*Royn*

**NOKIA 7250i**
Smart fartelefon 6 mðr. gomul. Hevur ma. kamera, litskerm, orðabók, mms, polyfoniskar ringitónar og radio. Gev eitt boð
*Tlf. +45 21698550 ella dac@nork.auc.dk*

**HYGG HER!**
ein super góður, lítið brúktur komplettur saðil til sølu, vegna plásstrot. Nývirði 5000 kr, prísuppskot 2500 kr. Áhugað vinarliga á
*til. 255915*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 3 mai kl. 19.00. Bussarnir koyra sum vanligt.
*Nevndin*

**BASARUR**
verður í Glæmuni í Kvívík 9. mai 2004. Um onkur vil lata lutir til basarin, kunnu tit kontakta Solveig tlf. 421414, Beintu 421680 og Jens Paula 421377. Takk fyri lutin.
*Glæman, KSR og skótarnir*

**TIL SØLU**
Hondvask (hvítt porselen) stødd 45 x 65 cm, við soylu og hill 15 x 65 cm.
*Tlf. 312416*

**GRUNDSTYKKI TIL SØLU**
Eitt byggibúgvið grundstykki uppi á Koll á Eiði við góðum útsýni, til sølu um hóskandi boð fæst. Stórt: 596 fermetrar.
*Tlf. 212462*

**FJARSTÝRDUR BÁTUR**
av model AWI 33, l. 103 cm, b. 33 til sølu fyri 7.000,- við allari útgerð.
*Ring 311263 ella 261033*

**B71-SØLUSTEVNAN**
verður á Sandoyar meginskúla í døgunum 1. og 2. mai. Byrjað verður kl. 14. Nógvir spennandi handlar eru við.
*Stuðulsnevndin hjá B71*

**NÝGGJA FARTELEFON?**
Nokia, Sony Eriksson, Siemens, Motorola og fleiri aðrar bíligar fartelefonir til sølu. Skriva hvat merki, modell og vit finna ein goðan prís. Ongantíð verið betur møguleiki at spara pengar. Skriva t-post til
*fartelefon@hotmal.com*

**NOKIA 7250i**
Telefonin ið hevur alt: camera, zoom, radio og alt annað ið kann ynskjast av eini mobil. Nýprísur 3499. Telefonin er tveir mánar gomul og til sølu fyri einans 2500 kr. Ring og spyr nærri á
*tlf. 263133*

**KONSERT OG FLØGUÚTGÁVA**
Í sambandi við at kórið Glymur hátíðarheldur 20 ára stovningardag, verður konsert í Kommunuskúlahøllini leygardagin 1. mai kl. 16.00. Eisini ber til at ogna sær nýggju fløguna, sum er komin í sølubúðirnar kring landið.
*Glymur*

**FARTELEFON**
Nokia 8110 I, við 2 eyka battaríum, vanligum løðara, borðløðara, billøðara, bilmoteringssetti, 2 taskum, reimhaldara og brúkaravegleiðing, í upprunaeskju, til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 322958*

**JØRÐ Í KVÍVÍK**
2 gyllin í ognarhaganum í Kvívík til sølu, um hóskandi boð fæst.
*tlf. 210174*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ericsson T39M til sølu fyri kr. 700,-
*Tlf. 317188*

**FLISEARBEJDE**
Mindre indedørs flisearbejde udføres.
*Tlf. 228058*

**TIL SØLU**
Armbåndsur Casio C-801 Digital med lommeregner, dato, stopur, læderrem. 200 kr.
*Tlf. 220687*

**TIL SØLU**
Spejlrefleks kamera, Nikon F5, m. Nikkor 35-70mm/2,8, blitz SB-28, SC-17 m.TTL, nikon Circular Polar, Nikon R60, Sigma Obj. 17-35mm D Aspherical, Manual, fik stor service juni 2003. Sælges kun i alt, kr. 19.000.
*Tlf. 220687*

Vaskikonur hittast:

# Vaskikonur og reint umhvørvi



**Hetta skuldi verið eitt frálíkt høvið at sett stevnu, sigur Sámal Bláhamar, sum hevur boðið vaksikonum og øllum sum hava áhuga í reinum umhvørvi til røður, sang, undirhald og nýggjan vitan um umhvørvi og reingerð**

VASKIKONUDAGUR

Staðið er Norðurlandahúsið og á skránni er meira enn slagsangir og arbeiðararøður. Leygarmorgunin 1. mai klokkan 9 verður hurðin í mentanarháborgin latin upp fyri tí stættinum, sum vanliga ger reint og tekur upp eftir øllum øðrum í samfelagnum.

- Eg haldi at tað er ein frálíkur dagur at hittast. Vaskikonurnar í landinum eru ein týðandi partur av arbeiðarafjøldini og tað er hesum bólkinum sum vit fegin skipa eitt tiltak fyri.

Ingiborg Winther formaður í Føroya Arbeiðarafelag fer at halda røðu og sum ein grønur tráður gjøgnum allan dagin fer navnframi vestmenningurin Finnbogi Joensen at koma við umhvørvisvinarligum ískoytum til vaskikonudagin.

Sjálvur hevur Sámal Bláhamar, saman við konuni Tórhardu, havt stóran áhuga fyri umhvørvinum. Og tað er ongin loyna at tiltakið 1. mai eisini setur vaskihættir, har tú sleppur undan at nýta kemikalir, í fremstu røð.

- Eg haldi at tíðin arbeiðir fyri okkum og tað merkja vit eisini her í Føroyum. Nógvastaðni runt um í heiminum verður farið frá at nýta sápu, tí hetta dálkar umhvørvið og er í flestu førum púra óneyðugt, sigur hjúnini Bláhamar.

### Undirhald og samveru

Ein stórur partur av lívinum er arbeiði, og tískil er tað eisini umráðandi at ein trívist í fakinum og at tað verður gjørt nakað fyri trivnaðin. Hetta halda fyriskipararnir sum eisini gera nógv burturúr undirhaldi og tónleiki á vaskikonudegnum.

Ein av gestunum verður danin Uffe H. Andersen, sum umframt at arbeiða innan ferðavinnuna, eisini er kendur sum skemtari og hypnotisørur. Uffe vann hjartað í fleiri hundrað kvinnum, tá hann á konudegnum í Nesvík 2001 helt fyrilestur og skipaði fyri undirhaldi. Úr Noregi kemur Terje Scheen, sum í nógv ár hevur arbeitt innan umhvørvi og reingerð, og hann fer at siga frá um vaskihættir uttan sápu.

Eisini hvat føroyskum undirhaldi viðvíkjur er nógv áhugavert og spennandi á skránni.

Av forvitnisligum innsløgum kunnu nevnast, at Maria Heinesen fer at spæla violin, Hávardur Jensen syngur og Hanus Joensen fer at spæla klaver. Eisini fer Brandur Enni at framføra nakrar sangir.

Á vaskikonudegnum leygardagin verða eisini framsýningar. Eitt nú klæðir til alla familjuna.

# Nei! segði lítla skríms




**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út barnabókina Nei! segði lítla skrímsl. Bókin kemur út samstundis í Danmark, Íslandi, Svøríki og Føroyum**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Hetta er søgan um lítla skrímslið, sum ræðist stóra skrímslið. Stóra skrímslið vil altíð ráða, tað maksar á myndirnar hjá lítla skrímsli, og nápar pengar frá skrímslamammuni. Og lítla skrímslið torir einki at siga. Men so ein dagin kemur vend í....

Bókina hava Kalle Güettler úr Svøríki, Rakel Helmsdal úr Føroyum og Áslaug Jónsdóttir úr Íslandi skrivað. Kalle og Rakel eru royndir rithøvundar og Áslaug er kendur teknari. Hevur eitt nú teknað framúr vøkru tekningarnar í Søguni um bláa knøttin, ið hevur fingið Barnabókavirðisløn Útnorðurs. Teksturin og tekningarnar í søguni um lítla skrímslið eru vorðin til á einum skeiði fyri barnabókarithøvundar, sum var í Svøríki fyri trimum árum síðani, har rithøvundar og teknarar í felag skuldu evna eina bók. Norðurlendsku forløgini hava tikið væl ímóti bókini, Edda í Íslandi, Bonniers í Svøríki og Danmark, og Bókadeild Føroya Lærarafelags í Føroyum.

Nei! segði lítla skrímsl kostar kr. 80 í bókabúðunum.



# HEILSANIR



**Maria Vestergaard**
Góða mostir, hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum í dag. Vit síggjast í summar.
**Heilsan Sigrun, Magda, Bertha og Lena**



Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara hin 27. desember 2003 so eydnuríkan og ógloymandi.
Vinarliga
**Salmina og Teitur**



**Góði Heini**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum og koyrikortinum. Minnist tú Bamse?
**Heilsan Pætur**



**Elskaði Heini**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum og koyrikortinum. Vit gleða okkum til túrarnar. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða Hanna !**
Hjartaliga tillukku á tínum 1 ára føðingardegi. Jesus pápi signi lívsleið tína . Eg eri so góð við teg.
**Heilsan stórasystir**



**Góði John**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 30. apríl. Vit ynskja tær alt tað besta á lívsleið tíni.
**Kærar heilsanir frá okkum øllum heima**



**Góða, elskaða Elin**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum ynskja **mamma, pabba og Maria**



**Góði Jónas**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Stuttligt at vit hava føðingardag sama dag. Eisini ein heilsan til Dianu.
**Heilsan lítla systurin Helena**



**Góða, elskaða Helena**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Alt tað besta fyri framtíð tína ynskja
**mamma, babba og David**
Eisini ein heilsan til Jónas frá okkum øllum.



**Góða stórasystir**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag ynskja **systrarnar við familju**



**Góði, elskaði Sverri!**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta. Vit elska teg.
**Omma, mostir og gubbi, Ann-Tordis og Anna-Katrin**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«